# Politikarar kolldøma útrokning um barnaansing

**Umsitingin hjá Klaksvíkar kommunu hevur roknað út, at tað loysir seg betur at gjalda fyri vantandi barnaansing enn at útvega nýggj ansingarpláss. Men sosiala nevnd vil ikki hoyra talan um hetta, og nú er útbjóðingartilfar um bygging av nýggjum ansingarstovni í Klaksvík sent út til átta byggifyritøkur**

BARNAANSING
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tað loysir seg betur fyri kommunukassan at gjalda fólki fyri vantandi barnaansing enn at økja um talið á ansingarplássum.

Tað er niðurstøðan í einari útrokning, sum umsitingin hjá Klaksvíkar kommunu hevur gjørt og latið sosialu nevnd hjá býráðnum.

Men sosiala nevnd tekur frástøðu frá útrokningini og staðfestir, at kommunan skal útvega fleiri ansingarpláss fyri at fáa bíðilistan til barnaansing niður.

– Vit ætla okkum als ikki at gjalda fólki fyri at ansa børnunum heima, bara tí at tað loysir seg betur. Hetta er ikki bara ein spurningur um pengar, men eisini ein spurningur um trivnað og møguleikar hjá fólki, og vit ætla at fáa fleiri ansingarpláss til vega, sigur Jórun Høgnesen, sum er forkvinna í sosialu nevnd hjá Klaksvíkar kommunu.

Harvið kolldømir hon útrokningina hjá umsitingini, og tað hevur hon undirtøku fyri bæði í sosialu nevnd og í fíggjarnevndini hjá Klaksvíkar kommunu.

### Umsitingin roknar út

Tað er Almannastovan, sum í fyrstu atløgu rindar fólki pengar, um tey ikki kunnu fáa ansingarpláss til síni børn. Hetta er eitt slag av endurgjaldi fyri, at fólk ikki kunnu vera á arbeiðsmarknaðinum.

Pengarnir, sum Almannastovan rindar fólki fyri vantandi barnansing, verða síðani tiknir innaftur gjøgnum skattaavrokningina hjá kommununum.

Umsitingin hjá Klaksvíkar kommunu hevur roknað út, at tað loysir seg betur fyri kommunukassan at gjalda fyri vantandi barnaansing enn at økja um ansingarplássini í kommununi.

Tí hevur umsitingin í einum skrivi mælt býráðnum til at umrøða barnaansingina í einum breiðum høpi, og tað fekk býráðið møguleikan til á fundi týskvøldið. Har stóð málið um barnaansingina á skránni.

Men tað er eingin undirtøka fyri at brúka útrokningina hjá umsitingini til nakað.

Bæði sosiala nevnd og fíggjarnevndin hava staðfest, at kommunan skal raðfesta eina loysn av barnaansingartørvinum.

– Sjálvandi skal kommununan hugsa um at fáa sum mest burtur úr hvørjari krónu, men vit fara á ongan hátt at velja eina loysn, har vit gjalda fólki fyri vantandi barnaansing heldur enn at gera nýggj ansingarpláss, sigur Jórun Høgnesen, forkvinna í sosialu nevnd hjá Klaksvíkar kommunu.

### Byggja nýggjan barnagarð

Klaksvíkar kommuna hevur júst sent út útbjóðingartilfar um bygging av einum nýggjum barnagarði í býnum. Átta byggifyritøkur hava fingið tilfarið, og tey hava nú nakrar vikur til at rokna eitt tilboð út.

Nýggi ansingarstovnurin skal byggjast við Traðargøtu, sum liggur mitt í einum lívligum barnakvarteri á vestursíðuni í Klaksvík. Økið var fyri nógvum árum síðani gjørt klárt til at byggja á, men byggingin gjørdist ongantíð veruleiki.



*Klaksvíkar kommuna hevur júst sent út útbjóðingartilfar um bygging av einum nýggjum ansingarstovni í býnum. Byggingin skal byrja sum skjótast, og við nýggja ansingarstovninum fáa klaksvíkingar eini 70 nýggj ansingarpláss*

*Mynd: Dávur Winther*

Fakfólk hava gjøgnumgingið gomlu tekningarnar av ansingarstovninum, og tekningarnar eru tíðarhóskandi, verður sagt. Tí kann farast undir byggingina av ansingarstovninum um stutta tíð.

– Vit ætla at gera so skjótt av, sum tað ber til. Nú skulu fyritøkurnar fyrst lata kommununi síni tilboð, men tá ið tey eru komin inn, gongur ikki long tíð til farið verður undir sjálva byggingina, sigur Jórun Høgnesen.

Nýggi ansingarstovnurin skal hýsa bæði barnagarði og vøggustovu, og tað verða umleið 70 ansingarpláss á stovninum.

Umframt hetta er ætlanin eisini at gera 15 pláss afturat á ansingarstovninum Blákolluni við Kjalarvegin. Tað skal gerast við at flyta spælistovuna hjá dagrøktini, sum heldur til í kjallaranum, og gera eina vøggustovu har ístaðin.

– Við hesum báðum ítøkiligum ætlaninum koma vit væl ávegis við at loysa ansingartørvin í kommununi, sigur Jórun Høgnesen.

# Hergeir leitar eftir undirtøku

**– Føroyska fólkið kann ikki liva við, at ein so álvarsamur ivi verður reistur ímóti løgmanni, sigur løgtingsmaðurin Hergeir Nielsen, sum ætlar at finna undirtøku fyri, at ein kanningarstjóri verður settur at kanna undirskrivingina av tollavtaluni við íslendingar**

POLITIKKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Løgtingsmaðurin Hergeir Nielsen ætlar at gera eina roynd at fáa undirtøku fyri, at ein kanningarstjóri verður settur at kanna undirskrivingina av tollavtaluni við íslendingar.

Umsitingin í løgtinginum hevur sett spurnartekin við heimildirnar hjá løgmanni at gera hesa avtalu uttan at løgtingið góðkendi hana, og tað er hendan iva, sum Hergeir Nielsen vil hava av vegnum.

– Føroyska fólkið kann ikki liva við, at ein so álvarsamur ivi verður reistur ímóti løgmanni. Okkara týdningarmesta lóg er stýrisskipanin, og hon kann samanlíknast við grundlógina í øðrum londum, og vit kunnu ikki liva, at løgmaður møguliga hevur brotið stýrisskipanarlógina, sigur Hergeir Nielsen.

### Ivast í undirskrift

Tað var tann 2. september í ár, at Jóannes Eidesgaard, løgmaður, skrivaðu undir eina avtalu við íslendingar um tollfrælsi. Hendan avtalan bygdi á ein meira umfatandi fríhandilssáttmála, sum var undirskrivaður tríggjar dagar frammanundan.

Sjálvur høvuðssáttmálin hevði fingið eitt einmælt viðmæli frá uttalandsnevndini, men hann er ikki enn samtyktur í løgtinginum.

Tá ið tollavtalan við íslendingar varð undirskrivað, hevði uttanlandsnevndin hjá løgtinginum ikki havt nakra viðgerð av henni, hóast einstakir limir í nevndini vóru spurdir um avtaluna.

Formaðurin í uttanlandsnevndini, Johan Dahl, bæð løgtingsskrivstovuna gera viðmerkingar til grundgevingarnar hjá løgmanni fyri at gera avtaluna, og í viðmerkingunum verður spurnartekin sett við heimildirnar hjá løgmanni at gera avtaluna, uttan at løgtingið var tikið við.

Johan Dahl segði tó við Sosialin í gjár, at hann gjørdi ikki meira við málið, og at nú var tað upp til løgtingið at gera av, hvussu leikur skuldi farast.

### Samgongan eigur at rudda

Hergeir Nielsen, sum umboðar størsta andstøðuflokkin, Tjóðveldisflokkin, í uttanlandsnevndini vil tó ikki sleppa málinum, og hóast løgmaður hevur grundgivið alment fyri sínari avgerð og sagt, at hann gjørdi einki skeivt, vil løgtingsmaðurin hava ivan um heimildarloysi av vegnum.

– Tað besta hevði verið, um samgongan sjálv ruddaði upp í hesum málinum. Tað kundi hon gjørt við at sett sáttmálan úr gildi aftur, og síðani gjørt hann eftir røttum mannagongdum. Men um samgongan ikki vil ella kann tað, so má okkurt annað gerast, sigur Hergeir Nielsen.

Hann sigur seg hava nakrar møguleikar fyri at fara víðari við málinum. Ein møguleiki hevði verið at sett ein skrivligan fyrispurning til løgmann, so hann fekk nærri frágreiðing um málið, ein annar møguleiki er at kæra til landsstýrismálanevndini, og enn ein møguleiki er at reisa misálit.

### Kanningarstjóri

Men stigið, sum Hergeir Nielsen helst vil taka nú, er at løgtingsformaðurin setur ein kanningarstjóra at kanna málið.

Fyri at ein kanningarstjóri skal setast, skulu tveir fimtapartar av løgtingsmonnunum heita á løgtingsformannin um at seta ein slíkan.

Hetta merkir samstundis, at andstøðan ikki einsamall kann gera hetta, tí hon hevur ov fáar løgtingslimir til at gera tað. Tí skulu samgongutingmenn verða við í áheitanini á løgtingsformannin.

– Um samgongan einki ger við málið, so fer eg at royna at fáa undirtøku fyri, at ein kanningarstjóri verður settur at kanna málið, sigur Hergeir Nielsen.